skemt

# Vakrasta geitin









Mangar eru kappingarnar, og stundum verður kappast um at finna vakrastu kvinnuna. Men hendan kappingin í Riyadh í Saudi Arabia er eitt sindur øðrvísi. Her snýr tað seg um at finna vakrastu geitina. Og ein vinnari varð funnin.





## Sunn last

Hesin bilurin lastar meira, enn mann skuldi trúð. Og lastin er sunn – súrepli frá dúrki til loft. Kundi verða líka so stuttligt at sæð eina mynd av, hvussu í allari víðu verð eigarin hevur fingið øll súreplini inn í bilin, og hvussu hann ætlar at fáa tey útaftur.





## Hvar er arbeiðs-eftirlitið?

Hesir báðir handverkararnir brúka hugflogið, tá teir koma fram á ein trupulleika. Hetta er í Eystureuropa, og har er eftir øllum at døma einki strangt arbeiðseftirlit at halda eyga við arbeiðsfólki.

## Málson ella Malson

**B36 hevur staðfest, at Karoly Potemkin skjýtur ov fá mál, og tí hava teir sagt sáttmálan við hann upp. Og hvussu kann mann so tryggja sær, at næsti álopsspælarin fer at verða stinnari frammanfyri málið. Jú, kanska við at keypa sær ein spælara við eftirnavninum Málson.**

## Kreativ velting

Ofta verða stór og sterk djór nýtt til at velta við, men hesin maðurin hevur eftir øllum at døma ikki nakað neyt ella nakran hest at hjálpa sær. Tíbetur fyri hann er konan til reiðar at taka eitt tak. Javnstøða ella ikki – hetta sær út til at rigga.



## Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Nær er so stytsti dagur?**
Dagurin í dag er styttur 12 minuttir síðani stytsta dag
*Útvarp Føroya*

**Hvat við misnýtaranum?**
Betri umstøður til viðgerð av rúsevnum
*Sosialurin*

**Hann mátti følt tað, um so var**
Kaj Leo Johannesen kennir seg ikki stungnan í ryggin
*www.uf.fo*

**Coldplay gestir?**
Vit spæla eitt sindur av tónleiki, meðan vit bíða eftir okkara gestum. Tað verður Coldplay.
*Radius í ÚF*

**Fólkini minka**
Tiltakið verður minni og eg rokni við, at spæliplássið riggar betri til hetta sum eitt hugnaligt og intimt spælistað. Hetta avmarkar sjálvandi, minni fólk sleppa til.
*Jón Tyril á Kjak.fo um munin á G! og G!mini*

**Ein og sami maður**
Løgmaður vil hava enda á stríðnum millum Jenis Hans Paula
*www.uf.fo*